## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
## Bygdarráðsfundur tann 25. september 2013, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Durita á Heygum, Malan Stórá, Herit Magnussen og John Zachariassen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 37**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um broyting av byggisamtyktini í samband við møguliga sølu av Winthers Húsi.
J. nr. 2013-111

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 18. september 2013 málið um Winthersa Hús – um broyting av byggisamtyktini í samband við møguliga sølu.

Nevndin mælir til at at broyta økið undir Winthers Húsum við hóskandi øki rundanum frá havnaøki til sethúsaøki.

**Viðv. 37**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Hilbert Elisson farin av fundinum vegna ógegni.

**Mál 38**
Tilmæli frá teknisku nevnd um umsókn frá VestPack um loyvi til um- og uppíbygging av virkisbygninginum á matr. nr. 355a.

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 18. september 2013 umsókn frá VestPack um loyvi til um- og uppíbygging av virkisbygninginum á matr. nr. 355a.
Ætlandi skal handil gerast í bygninginum.
Hilbert Elisson, formaður, stendur sum umsøkjari vegna VestPack. Hilbert svaraði spurningum frá nevndini, men var annars ikki við í viðgerðini.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti treytað av,
- at brunatrygdarligu viðurskiftini verða skipað sambært kunngerð,
- at matrikkulin verður umskipaður soleiðis, at parkeringsplássini frammanfyri verða innanfyri matrikkulin,
- at goymsla av vandamiklum løgi (klori, sýrum o.t.) verður flutt úr bygninginum.

**Viðv. 38**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Hilbert Elisson komin aftur á fund.

**Mál 39**
Tilmæli frá teknisku nevnd um umsókn frá Finn Jørgin Olsen um umskipan innangarðs ímillum ogn hansara matr. nr. 328 og matr. nr. 319a hjá Erlu Olsen.

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 18. september 2013 umsókn frá Finn Jørgin Olsen um umskipan innangarðs ímillum ogn hansara matr. nr. 328 og matr. nr. 319a hjá Erlu Olsen

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 39**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 40**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014 til framløgu/1. viðgerð.
J. nr. 2013-106

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 18. september 2013 uppskot fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013 fyri bygdarráðið til 1. viðgerð.

**Viðv. 40**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013 varð lagt fram.

**Mál 41**
Tilmæli frá Paula T. Petersen, borgarstjóra, um uppskot til viðtøkur fyri eitt nýtt kommunufelag.

Vestmanna Kommuna hevur móttikið skriv frá Føroya Kommunufelag, har sagt verður frá at samráðingarnar millum Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya eru komnar so langt, at semja er um viðtøkurnar fyri eitt nýtt kommunufelag, sum eftir ætlan skal eita Kommunufelag Føroya.

Heitt verður á limirnar at viðgera viðtøkurnar fyri nýggja felagið, og senda skrivstovu FKS's svar uppá, um undirtøka er fyri viðtøkunum.

Undirritaði mælir bygdarráðnum til at taka undir við viðtøkunum.

**Viðv. 41**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 42**
Tilmæli frá Havnarnevndini um at geva Havnarnevndini heimild til at samráðast og gera avtalu við P/F Thor.
J.nr. 2013-120

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi 16. september 2013 munnligan fyrispurning frá P/F Thor um tilboð upp á at leggja nøkur av skipum teirra í Vestmanna.

Nevndin mælir til, at Bygdarráðið gevur Havnarnevndini heimild til at samráðast og gera avtalu við P/F Thor.

**Viðv. 42**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin.

Fundurin lokin kl. 21.45.

Sign.:

Pauli T. Petersen    Karl A. Olsen    Hilbert Elisson

Malan Stórá    Durita á Heygum    Herit Magnussen    John Zachariassen